Álit

í

løgtingsmáli nr. 88/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkanøvn (At taka eftirnavn ella millumnavn við giftu)

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum hevur lagt málið fram 18. februar 2021, og eftir 1. viðgerð 3. mars 2021 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 10. mars 2021.

Við uppskotinum gerst møguligt hjá hjúnafeløgum at fáa somu samanseting av millum- og eftirnøvnum við tað, at hjúnafelagar fáa rætt til at taka millumnavnið hjá makanum. Higartil hava hjúnafelagar einans fingið játtað, at eini hjúnafelagin fær eftirnavnið hjá hinum. Heimild hevur ikki verið fyri at loyva hjúnafeløgum at fáa millumnavnið hjá makanum sum sítt millumnavn. Við broytingini fáa hjúnafelagar frameftir loyvi til eisini at fáa sama millumnavn.

Í uppskotinum verður somuleiðis ásett, at freistin at kæra avgerðir hjá navnanevndini til landsstýrismannin er 4 vikur.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Rættarnevndin, 15. mars 2021

Christian Andreasen formaður	Ingilín Didriksen Strøm næstformaður	Frimodt Rasmussen
Erhard Joensen	Steffan Klein Poulsen	Sirið Stenberg

Hervør Pálsdóttir